**IVECO MOTORUR**
IVECO 60 HK bátamotorur bíliga til sølu.
*Tlf. 217910/447910*

**STOKKAR (MAGASIN)**
Stokkar til beitir egningartrakt (70 cm) ynskist til keyps.
*Tlf. 218887/311280*

**BÁTAMOTORUR**
Ein Voldo Penta TAMD 41h-a 200 HK, bíliga til sølu. Motorurin krevur ábøtur ellakann nýtast til eykadeilir.
*Tlf. 457645/220379*

**TIL SØLU**
Gott línuspæl til sølu.
*Tlf. 361332*

**FØROYSKUR FRAMBYGDUR BÁTUR**
stødd 7,22 l. br. 2,37. dýpd 1,02 m. Maskina Volto Penta 36 HK, byggiár 1974, til sølu.
*Tlf. 441048/265816*

**SNELLA TIL SØLU**
Ein íslendsk DNG-snella til sølu, nýggjari slagið.
*Tlf. 282499*

**TIL SØLU**
Fiskiloyvi B5.
*Tlf. 224986*

**TIL SØLU**
20 stampar 5,5 mm svøvlalína helvt um helvt, toska og kalvalína og 11 stampar 3,5 mm svøvlalína ávikavist kr. 800,- og kr. 500 pr. stk.
*Tlf. 221866*

**SNELLUR TIL SØLU**
4 óbrúktar snellur til sølu.
*Tlf. 225112*

**BÁTAMOTORUR**
Bátamotorur til sølu 200 HK Caterpiller bíliga til sølu.
*Tlf. 282246*

**BÁTAGEAR**
Eitt vinkulgear við umstýring og skrúvugreiðum av merkinum Servogear typa v/d 60C Red 1.9-1 bíliga til sølu.
*Tlf. 282246*

## Bingo

**PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN**
hevur BINGO í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 26. januar kl. 18.00. Limirnir kunnu taka gest við.

**BINGO**
verður í Pálsstovu hósdagin 27. jan. kl. 19. Full pláta 500 kr. Á lutaseðli 200,- 300,- . Fu. 500,- 1.000,- og 1500 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Kyndil*

**GOTT BINGO**
verður í Pálsstovu mánakvøldið 24. januar kl. 19.00.15 ókeypis plátur. 15 vinningar á lutaseðli. Høvuðsvinningur á lutaseðli er eitt gávukort frá Shell à 2.000 kr. Øll eru vælkomin.
*Astma- og Allergifelagið*

**BINGO VERÐUR Í PÁLSSTOVU**
sunnudagin 23. januar kl. 16.00. Full pláta 10 x 400 kr., 2 x 600 kr. Á lutaseðli 20 vinningar, 1 x 200 kr., 1 x 300 kr., 2 x 500 kr. og 2 x 1000 kr. Eyka spæl. Koyring heim.
*Kiwanisfelagið Rósan*

**FRÁ TÓRSHØLL**
Gott bingo verður leygardagin 22. januar kl. 20. Eykaspøl, minibingo, 20kr. spæl vera eisini spæld. Øll vælkomin.
*Tórshøll*

**GOTT BINGO**
Verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi mánakvøldið 24. januar klokkan 19.00. Eisini verður bingola spælt. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*H.S.R*

**BINGO**
verður í Felagslonini leygardagin 22. januar kl. 16.00.
*Felagslonin*

**TVØROYRAR KLUBBI**
Gott bingo verður í Tvøroyrar klubba leygardagin 22. januar kl. 19.30. Minna eykaspælið endar. 5 kr. spæl.
*Nevndin*

**SUÐUROYINGAR**
Gott bingo verður í Skúlahøllini í Trongisvági mánakvøldið 24 jan. kl. 19.00.
*Tvøroyrar Svimjifelag*

## Bøkur

**ER TAÐ NAKAR**
sum hevur bókina »Emely går sine egne veje« eftir L. M. Montgomery at selja mær? Vinarliga ring
*tlf. +45 23732637 ella 254924*

## Burturm. /funnið

**TANN**
sum av misgáum hevur tikið ein svartan jakka av merkinum »Five« í Klaksvíkar klubba leygarkvøldið 4. des. 2004, verður vinarliga biðin um at ringja á
*tlf. 268772 eftir kl. 15*

**SKÓGVAR UMBÝTTIR**
á L.R. jólafrokostinum tann 15. januar 2005 í Bovlinghøllini. Eg havi tínar Gabor skógvar, mínir hava reytt innlegg.
*Tlf. 252676, Elsebeth*

**LEÐURJAKKI UMBÝTTUR TANN 11.1.2005**
Sóknist eftir einum myrkabrúnum 3/4 longum leðurjakka við hettu og einlittum myrkum fóðri, stødd l. Havi í staðin fingið annan brúnan 3/4 langan leðurjakka við hettu og puntutum fóðri, stødd s. Umbýtið gjørt tann 11.1.2005 í heiminum hjá Katrin og Poul Erik Fjallsbak í Miðvági eftir jarðarferðina hjá Beintu.
*Tlf. 264556*

**SIEMENS S45**
v/ skøltamyndum funnin á Hvarvinum týsdagin 18. januar.
*Tlf. 313651*

**MIST ARMBAND**
Havi mist eitt silvur mannfólkaarmband á Tvøroyri. Um tú hevur funnið tað, so vinarliga ring
*tlf. 372062*

## Býli

**HÚS Á BYGD TIL LEIGU**
møbleraði, klár at fara inn í.
*Tlf. 508878*

**GÓÐ SETHÚS**
Ynskjast til keyps í Havn. Skal hava 2 sjálvstøðugar íbúðir.
*Tlf. 580160*

**HÚS Í SALTANGARÁ TIL SØLU**
Húsini eru 111 fermetrar við innrættaðum kjallara. Grundøkið er 1200 fermetrar við stórum hava og gott útsýni. Verða seld um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 447476*

**HÚS TIL SØLU**
Hús til sølu í Trongisvági.
*Tlf. 212281*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Eg eri 33 ár, søki íbúð í Havn, royki ikki, fari væl um. Max. 4.000,- kr.
*Tlf. 255089*

**UNGT PAR**
við nýføðingi søkja lítil hús ella íbúð í ella á bygd, nær við Havnina. Helst á fastlandinum.
*Tlf. 509991/749991*

**HÚS Í SØRVÁGI TIL SØLU**
Vegna flyting, og um hóskandi boð fæst, eru eldri nýistandgjørd hús í Sørvági til sølu, standa væl fyri og hava gott útsýni. Tvey úthús fylgja við í keypinum.
*Tlf. 50731148 ella e-mail: jara72@stofanet.dk*

**ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU**
til friðarlig fólk, kr. 3.800,- uttan ljós og hita. 2 rúm, 1 stova, køk, gong, brúsa + wc. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 2007/4*

**VIT ERU EITT PAR**
sum ynskja at leiga eina íbúð í Havn. Íbúðin má vera í góðum standi og hava hvítvørur. Vit gjalda max. 6.000,- incl. ljós og hita.
*Tlf. 314521/274532/274523*

**TIL LEIGU**
Ovara hædd á húsum 104 kvadratm. er til leigu frá 1. mars 2005. Liggja í friðarligum umhvørvi, (5 min. frá SMS). Stór stova, køkur, tvey kømur, wc/bað og gongd. Kostnaðurin er 6.500 við ljós og hita, 2. mðr. í depositum krevst. Áhugaði kunnu senda teldupost til :
*ss@kallnet.fo*

**TIL LEIGU Í KLAKSVÍK**
Eldri hús við Klaksvíksvegin í Klaksvík til leigu.
*Tlf. 273901 eftir kl. 18*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Maður søkir íbúð í Havn. Max. 3.500,- um mðr. Fari væl um og gjaldi til tíðina.
*Tlf. 582924*

**HÚS TIL SØLU**
Hús í Sandavági til sølu.
*Tlf. 582134*

**ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST TIL LEIGU**
í Tórshavn ella Norðstreymoy frá 1. febr. ella 1. mars. Vit eru eitt par við 2 børnum. Vit fara væl um, roykja ikki, gjalda rættstundis.
*Tlf. 310245/510245*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
Á eystara armi á Skálafjørðinum. 50 fermetrar við øllum hentleikum. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 2005/4*

**TIL LEIGU**
2 kømur til leigu í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað, vaskimaskinu. Nær við Læraraskúlan.
*Tlf. 221158/514765*

**MAMMA**
við tveimum børnum søkir íbúð í Havn, helst í vesturbýnum. Má hava tvey kømur.
*Tlf. 580856*

**SKOPUN**
Hús ynskjast til leigu við møguleika fyri keypi innan stutta tíð.
*Tlf. 503636/508636 á kvøldi*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
Køk, stova, tvey kømur, wc og baðirúm til leigu til friðarligt par fyri 4.000,- við olju og ljós. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 2005/1*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Mamma við 3 børnum ynskir íbúð til leigu í Havn beinanvegin. Prísuppskot 6.000 kr. við øllum.
*Tlf. 581048*

**SETHÚS TIL LEIGU**
Frá 1.2.2005 til fólk ið fara væl um. Húsini liggja væl fyri mitt í Havn í barnavinarligum umhvørvi. Stór stova, køkur, 3 sovikømur, 1 baðirúm við wc, vaskirúm og annars allir hentleikar.
*Tlf. 215956*

**MAMMA VIÐ**
20 ára gamlari dóttir søkir eftir einum húsum til leigu. Max. 1. mió. ella eini hús til leigu fyri max. 6.000 um mðr. v/ ljós og hita í Tórshavn.
*Tlf. 311499/581675/267618*

**ÍBÚÐ Í AALBORG**
Nýggj 80 fermetra 3-verilsis íbúð við egnum hava og p-øki í friðarligum umhvørvi til sølu. Í íbúðini eru allar vanligar hvítvørur.
*Áhugað ringi 540857 ella meyla sunic@post.olivant.*

**DUPULTHÚS VIÐ SERA GÓÐUM ÚTSÝNI TIL LEIGU**
pr. 1.02.2005. í barnavinarligum umhvørvið. 1. hædd/stór gongd/bryggers/2 x soviverilsir/og stórt baðirúm við klædnarúmi. 2. hædd/ wc/ hjúnarúm/góður køkur/ stova og altan. Prísuppskot: 7000,- + ljós & hita. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1992*

## Dansur

**VÁGA DANSIFELAG**
Dansað verður sunnukvøldið 23. januar í Beitishúsinum. Ársveitslan verður tann 29. januar saman við Eysturoyar Dansifelag. Tilmelding hjá nevdarlimunum.
*Nevndin*

**ALMENNUR**
føroyskur dansur verður í Bygdarhúsinum í Hósvík 22. januar frá kl. 22.00. Kostnaður er 60 kr. breyð, kaffi og te eru íroknað atgongumerkið.
*Bygdarfelagið Varðin, Hósvík*

## Dýr

**TIL SØLU**
Dvørghamstrarar til sølu
*Tlf. 421665*

**SEYÐAHUNDAHVØLPAR**
8 vikur gamlir border collie seyðahundahvølpar til sølu. Klárir at lata.
*Tlf. 212218/332125*

**DVØRGAKANIN**
8 mðr. gamal hann til sølu.
*Tlf. 310117*

**TIL SØLU**
Tvey gásapør ávíkavist 4 og 5 ár.
*Tlf. 443164 eftir kl. 18*

**INNBÚGV TIL SØLU VEGNA FLYTING**
Sofa Vento 3+2 2.000,- Sofaborð, spísiborð Linda + 4 stólar 1.000,- Skenkur Vienna v/ hill og ljósi 2.500,- Klædnaskáp Firenze 800,- Dupultsong Inger v/ box. 2.000,- Bíligari alt í einum.
*Tlf. 281802*

**HYGG HER!**
Kvígir, sum kálva apríl-juli til sølu. Ring og hoyr nærri á
*tlf. 214832, Mortan*

**KETTLINGUR**
Sera fittur kettlingur fæst, mamman er óvanliga spøk.
*Tlf. 422454*

**GÓÐ RYSSA TIL SØLU**
16 ára gomul ryssa til sølu.
*Tlf. 211789, Óli Johan*

**FITTUR KETTLINGUR!**
Er tað onkur, ið vil eiga meg? Eg eri trýlitt og mega fitt. Dugi at eta og leppa. Klár at fara heimanfrá um ca. 2 vikur.
*Tlf. 312191/267780*

**EIN FITT SVØRT KANIN**
verður latin djóravini. ca. 6 mðr. gamal.
*Tlf. 320325/509880*

**BORDER COLLIE HVØLPUR**
7 vikur gamal, av góðum seyðahundaslag, til sølu.
*Tlf. 218727*

**ILDBUGSSALAMANDER**
3 Salamandarir til sølu við øllum tilhoyri fyri 400 kr.
*Tlf. 254705*

**KETTLINGAR**
Sera fittur strípútur frensur kann latast til djóravin.
*Tlf. 260764*

**DVØRGAHAMSTRARAUNGAR**
Vit eru 6 fittir ungar, men vit mangla eitt heim. Mamm sigur, at vit eru for stórir atbúgva hjá henni. Vilt tú hava ein ella fleiri av okkum, so ring
*452118 ella 229418*

**HVØLPUR**
Ein fittur svart/hvítur hvølpur verður latin djóravini, kann avheintast nú.
*Tlf. 226806*

**Ynskist**
Tvey pør av Zebrafinkum.
*583203*

**Ynskist**
Tvey pør av Zebrafinkum.
*274166*

**FITTIR KETTLINGAR**
3 sera fittir kettlingar, kunnu latast djóravinum beinanvegin.
*Tlf. 316739/283639*

**MARSVÍN**
2 marsvín við stórum búri til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 220464*

**FØROYA FITTASTI KETTLINGUR**
7 vikur gamal frensur er klárur at lata djóravini 24. januar. Er reinligur, kerligur og vanur við børn. Ketlingurin er strípútur og á liti er hann hvítur, brúnur og svartur. Til ber at síggja meg á http://123hjemmeside.dk/kettlinguri n/
*Ringjast kann á tlf. 223087 eftir kl. 15:30*

**EKTAÐIR BORDER COLLIE**
hundahvølpar til sølu kunnu latast í viku 7, tað er av írskum seyðahundaslag. Mamman og pápin eru sera rólig og akta væl.
*Tlf. 581614*

**ER TAÐ NAKAR**
ið hevur ein gullhamstraraunga ella hamstraraunga at selja/lata mær? Eri djóravinur. Um tit hava ein, so vinarliga ring
*tlf. 422988/265223*

**FRENSUR**
Ein 1/2 ára gamal frensur verður latin vegna ovurviðkvæmi. Frensurin er róligur og vanur við børn. Vónandi er tað onkur, sum kann geva honum eitt nýtt heim.
*Tlf. 317990/517990*

## Fundir

**HAGAFUNDUR**
Svínáahagi Sunnara Helvt hevur fund í Norðskála-OyraSkúla, sunnudagin 30. jan. 2005 kl. 15. Skrá: 1.Roknskapur 2.Val av hagastýri.
*Hagastýrið*

**AÐALFUNDUR**
Suðuroyar Tjóðveldisfelags verður mánadagin 7. februar. Skrá sambært lógum felagsins. Tíð og stað verður lýst seinni.
*Vegna nevndina Sólrun Danielsen*

**FØROYA URTAGARÐSFELAG**
Ársaðalfundurin verður týsdagin 25. januar 2005, kl. 19.00, á Landsbókasavninum. Skrá sambært lógina. Vit taka samanum royndirnar við sortugrøsum.
*Nevndin*

**FØROYA URTAGARÐSFELAG**
Ársaðalfundurin verður týsdagin 25. januar 2005, kl. 19.00, á Landsbókasavninum. Skrá sambært lógina. Vit taka samanum royndirnar við sortugrøsum.
*Nevndin*

## Húsarhaldstól

**YNSKIST**
Brúkt uppvaskimaskina og brúkt vaskimaskina ynskist. Ikki avgerandi hvønn lit tær eru, bara tær eru vælvirkandi.
*Tlf. 584342*

**KULDASKÁP**
Eitt kuldaskáp fæst sera bíliga.
*tlf. 215157*

**STÓRT KØLISKÁP**
145 cm. høgt, til sølu vegna flyting. 1 ára gamalt. Nýprísur 4.123,- verður selt fyri 1.500,-
*Tlf. 223165*

**KOMFÝRUR YNSKIST TIL KEYPS**
Ein komfýrur, vanlig stødd, men kann eisini vera eitt sindur minni, ynskist til keyps.
*Tlf. 315152/515152*

**VASKIMASKINA**
2 ára gomul vaskimaskina til sølu fyri 2500,- vegna flyting, í góðum standi. 2 boxmadrassir 500 kr. stk. í góðum standi, vegna flyting.
*Tlf. 583369*

**GRAM KØLISKÁP**
hædd 106 til sølu fyri 2000,- kr.
*Tlf. 316451*

**KØLI- OG FRYSTISKÁP**
av merkinum LEC til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 282246*

## Innbúgv

**TIL SØLU**
1 spísiborð lakerað bók við 2 plátum 80 x 120/190 cm.
4 krostólar lakerað bók.
4 pinnastólar v/ stofsetur, lakerað bók. Til sølu samlað ella hvørt sær.
*Tlf. 424386*

**YMIST TIL SØLU**
Spísiborð 2 m x 92 cm. og tveir leður lenistólar til sølu.
*Tlf. 312322*

**HEY HEY!**
Vit bjóða okkara høgt elskaðu 2+3 sofur til sølu. Tær eru sera væl viðfarnar úr ljósum leðri. Nýprísur 15.000,- kr. Tær verða seldar fyri 5.000,-. Sparið 10.000,- kr.
*Tlf. 310584/510584*

**TIL SØLU**
2 telduborð til sølu, kr 200 pr. stk, kr. 300 fyri bæði.
*Tlf. 522120*

**ANTIKKIR MØBLAR TIL SØLU**
3 personars sofa + stólur, betrekt við vøkrum velour + vakurt sofaborð til sølu. (borðplátan má viðgerast)Prísuppskot: Kr. 5.500,-
*Tlf. 522120*

**BRÚKT LEÐUR HORNASOFA**
ynskist til keyps fyri sámuligan prís, helst ljós ella ljóstbrún á liti. Um tú hevur eina at selja, so vinarliga ring
*Tlf. 443598 ella 267588*

**YNSKIST**
Hvít WC kumma ynskist.
Blandings battarí til brúsu ynskist umframt krana til køksvask og hondvask.
Dustsúgvari ynskist. Sengur (box madrass) 120 cm breiðar og einkult sengur ynskjast.
Mugu vera í góðum standi.
*Tlf. 584342*

**SOFABORÐ TIL SØLU**
Sera snotuligt sofaborð til sølu. Útskorið, hvítt við glasplátu í miðjuni og hill niðri undir breidd: 90 cm, longd: 140 cm. til sølu fyri kr. 3.850,- (nýprísur uml. kr. 9.000,-)
*Ring tlf 554508*

**VEGNA FLYTING**
hava vit ymiskt at selja, so sum tær kommodur, leðursofu, svartir stólar, køksborð, reolvegg og eina uppvaskimaskinu.
*Tlf. 254705 og hoyr nærri*

**MØBLAR TIL SØLU**
Runt borð + pláta 120 cm.
4 stólar,
hornaskáp b. 90, h. 185 cm.
Skenkur + yvirskáp l. 152 cm. h. 170 cm.
Hornasofa 210 cm.
*Tlf. 213205*

**SERA VAKURT SKÁP!**
Mexico skáp til sølu. Tað er myrkt og sær út sum gamalt. Vælhildið og í sera góðum standi. Nýprísur 13.000 selist bíligari. Áhugað ringið
*tlf. 226082*

**HEY HEY!**
Er tað nakar, sum eigur ein lítlan barnabonk, har setrið er líka at hava leikur í, at selja mær?
*Tlf. 506776*

**RADIATORAR**
Einkultir radiatorar: 2 á 120 cm, 1 á 105 cm, til sølu fyri 100 kr. stk.
*Tlf. 316451*

**TIL SØLU**
1 køksborð,
4 stólar,
kondisúkkla,
3 manssofa við 2 lenistólurm,
bíliga til sølu.
*Tlf. 316825 ella 541440 eftir kl. 16*

**UNGDÓMSREOL**
Svørt reol við skápi fæst við at avheinta hana.
*Tlf. 220464*

**SO GOTT SUM**
nýtt sitibaðikar bíliga til sølu.
*Tlf. 318406/283406*

**KØKSBORÐ TIL SØLU**
stødd 78 x 118 cm. hvítt bókatræ, 250 kr.
*Tlf. 258543*

## Lutaseðlar

**TVØROYRAR SVIMJIFELAG**
Ikki avheintaðir vinningar av lutaseðlum hjá Tvøroyrar Svimjifelag drignir 15 des. 04.
Vinningur nr. 1 lutaseðil nr. 974, vinningur nr. 3 lutaseðil nr 1332, vinningur nr 4 lutaseði nr 2445, vinningur nr 7 lutaseðil nr 1993, vinningur nr. 11 lutaseðil nr. 2026. Sigið frá í seinasta lagi 31 januar á tlf. nr. 221141 eftir hetta, falla vinningar aftur til felagið.
*Tvøroyrar Svimjifelag*

## Matur

**TIL SØLU**
Veðrakrov og gásapør og 2 turr gásakrov.
*Tlf. 252897*

## Pløgg

**BRÚKTUR SKÓTABÚNI**
til drong uml. 12 ár, ynskist til keyps.
*Tlf. 310082/251369*